# Byggimeistarin byggi



*Gunleif Vestergaard hevur innrættað sær ein verkstað heima í Maritugøtu í Hoyvík. Hann hevur altíð okkurt at tríva í og byggir modellbátar og ger aðrar prýðislutir*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Á jólum fingu allir níggju abba- og langabba-synirnar hjá fyrrverandi byggimeistaranum, Gunleifi Vestergaard í Hoyvík, hvør sín heimagjørdan kappróðrarbát í jólagávu

### Frítíðarítriv



**Magnus Gunnarsson**
maggi@sosialurin.fo

Gunleif Vestergaard er kendur sum ein góður handverkari, hann er eisini ein handverkari í orðsins rætta týdningi. Hann hevur millum ár og dag gjørt alt frá smúkkum til stórar bygningar. Alt sum hann ger, er snøgt og væl úr hondum greitt.

Í fjør gjørdi Gunleif tilsamans níggju modell-kappróðrarbátar, 8-mannafør, til abba- og langabba-synirnar, sum hann gav teimum í jólagávu.

Gunleif Vestergaard er 81 ára gamal og sumbingur. Hann lærdi til timburmann hjá Kim Nielsen, byggimeistara, í Sumba, og seinni til bygningssnikkara hjá Tom Silvurdal, snikkara í Vági. Gunleif giftist Daniu, f. Berg, úr Hvalba. Tey búsettust í Vági, har Gunleif arbeiddi sum timburmaður og bygningssnikkari.

Síðst í 50-unum bleiv so lítið at gera hjá Gunleifi í Vági, og í 1962 flutti familjan til Havnar at búgva. Hann fekk arbeiði hjá danska felagnum, sum bygdi húsið í Mjørkadali. Í hesum sambandi fekk hann seinni arbeiði á snikkaravirkinum hjá føroyska byggifelagnum Danberg & Joensen í Havn. Har gjørdu teir alt tilfarið til tunlarnar inni í fjallinum á Sornfelli sum t.d. veggir, loft, gólv og annars alt snikkaraarbeiði. Alt varð gjørt á snikkaraverkstaðnum, sum var yviri við Strond, og varð síðan koyrt við bili niðan á Sornfelli og sett upp inni í fjallinum.

Eftir at snikkaraverkstaðurin hjá Danberg & Joensen miðskeiðis í 60-unum brendi í grund, byrjaði Gunleif at arbeiða sum sjálvstøð-